## Súni og teir spældu javnt



Um vikuskiftið spældi danska superligaliðið AaB dyst í Intertoto Cup. Mótstøðuliðið var FC Honka úr Finlandi. Súni Olsen byrjaði dystin á miðvøllinum, meðan Jón Rói Jacobsen sat á beinkinum. Dysturin endaði við javnleiki, eftir at AaB tvær ferðir hevði lagt seg á odda. Úrslitið gjørdist 2-2, og tað kann AaB brúka sum útgangsstøðu til seinna dystin, sum verður spældur á heimavølli næsta vikuskifti.

## Nýggjur ítróttarstjóri í Chelsea

Enska felagið Chelsea hevur sett ein fyrrverandi ísraelskan landsliðsvenjara sum ítróttarstjóra. Maðurin eitur Avraham Grant, og hann kemur úr Portsmouth, har hann hevur røkt líknandi uppgávu. Grant skal samstarva við venjaran Jose Mourinho, stjóran Peter Kenyon og talentsjefin Frank Arnesen um gera eina yvirornaða fótbóltspolitikk fyri felagið, sigur Chelsea í tíðindaskrivi.

Føroyar-Saaremaa 2-3 (19-25, 19-25, 25-18, 14-25):

# Klassamunur

**Føroyska liðið fekk at kalla einki gjørt móti Saaremaa, sum snøgt sagt var klassar oman fyri føroyska liðið**




*Tað sá mest sum óveruligt út, tá 5'arin hjá Saaremaa ferð eftir ferð bara smashaði langt oman fyri føroyska blokkin og í gólvið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir fantastisku hálvfinaluna móti Rhodos var vónin, at føroysku flogbóltsmenninir fyri fyrstu ferð síðani 1989 skuldu taka gullið á oyggjaleikum.

Men tann vónin gjørdist ikki meira enn tað sama. Frá fyrsta til seinasta bólt stóð greitt, at Saaremaa hevði eitt lið, sum var væl sterkari enn okkara. Og tá føroysku móttøkurnar als ikki fingust at koyra, kundi tgað bara ganga ein veg.

At føroyska liðið vann triðja settið, komst einamest av, at Saaremaa tá byrjaði at taka sær av løttum. Og munurin millum liðini var so heldur ikki størri enn so, at føroyingarnir megnaðu at revsa hetta. Men tá teir grønu so tóku sær um reiggj, kundu teir endaliga punktera dystin. Fjórða settið tók ikki meira enn 22 minuttir at avgreiða, og við samanlagt 93 stigum móti 77 kunnu føroyingar neyvan seta ein tann einasta fingur á sigurin hjá Saaremaa.

# Lítið at gera

Vanliga er Jóhan Petur á Stongum maður fyri at fiska tað mesta upp av gólvinum, tá hann røkir libero-leiklutin á føroyska flogbóltslandsliðnum.

Men fríggjadagin kundi heldur ikki hann gera nakað. Og tað var hann eisini skjótur at ásanna, tá dysturin var av.

- Nei, har gekk ikki alt ov væl í dag. Hasin fimmarin hjá teimum slær snøgt sagt bóltarnar upp um blokkin hjá okkum, og so er ikki nógv at gera.

Tað var kanska eisini hann, sum var størsti munurin á liðunum?

- Bæði og. At byrja við gongur sera illa hjá okkum við móttøkuni, og so gongur spælið striltið.

Vanliga verður tikið til, at tú vinnur ikki silvur, men tapir heldur gull. Er kenslan hjá tykkum kanska kortini, at hetta var á leið tað, sum kundi røkkast?

- Nei. Vit ætlaðu okkum so heilt avgjørt gullið. Men tað skuldi bara ikki vera, segði Jóhan Petur á Stongum at enda.

-mørk



*Hóast vónbrot, so var yvirskot kortini til at geva unnustuni eitt klemm, tá gulldysturin hjá Føroyum enn einaferð endaði við silvuri*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Tveir kandidatar eftir

**Uttan at spæla fekk B36 ein kappingarneyta minni í oddinum, og í botninum eru AB og VB/Sumba mest sum prísgivin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn eru 990 minuttir eftir av Formula-bólti hjá teimum 10 liðunum í deildini, men 16. umfarið teknaði sína týðuligu mynd av, hvussu kappingin hevur lagað seg.

Í oddinum enn tá heilt týðuligt, tá EB/Streymur á heimavølli snávaði móti B71. Samansetta liðið, sum í fjør var bara minuttir frá sínum fyrsta FM-heitið, hevur í ár havt sera trupult við at fáa glið á spælið. Og tó at úrtøkan kortini hevur verið á eini leið, so var tapið fyri B71 kanska ikki heilt so óvæntað, sum talvan annars ber boð um. Men tað staðfesti, at tað neyvan verður í ár, at EB/Streymur fer at seta seg allar ovast av øllum.

Tað stríðið tykist nú vera ein spurningur, sum B36 og NSÍ skulu greiða. Enn er B36 ovast av hesum báðum, men tað er ein veruleiki, sum skjótt kann broytast. Bæði tí B36 í næsta umfarinum – tað verður tann 5. august – hevur truplan útidyst á Sandi. Og tí B36 til ta tíð eisini kann missa tey bæði stigini, sum teir vunnu á skrivaraborðinum hjá Aganevndini hjá FSF.

### KÍ nýtist 8 stig

Í botninum tykist dysturin nærum vera av hjá VB/Sumba og AB. KÍ kann enn ikki siga seg heilt frítt frá niðurflytingarvandanum, men sigurin hjá teimum á júst AB gav nakað av luft niður til strikuna. Og við dystum móti Skála (h), GÍ (ú) og B71 (h) fyrstu trý umførini eftir steðgin, eru vónirnar hjá KÍ helst, at tað skal bera teimum til at skræða seg púrasta úr vandaøkinum. Verður hugt at stigatalvunum fyri tey bæði seinastu árini, har eisini 27 umfør eru spæld, so skuldu eina staðni millum 20 og 23 stig verið nóg mikið fyri at sleppa sær undan niðurflyting.

Tað gevur so eina kapping, har HB, GÍ, Skála og B71 øll stríðast fyri at sleppa upp í part, tá Inter-toto plássið verður útskrivað. Megnar HB at vinna steypafinaluna, sum teir ætlandi verða partur av, so verður tað helst EB/Streymur, sum við einum triðja plássið tekur sær av hesum. Men tað er tó einki at ivast í, at eisini teir fegnir vilja hava løgmanssteypið í sín part.